ítróttur

Nr. 13 • Mikudagur • 18. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Challenge-Trophy broytir kappingina

**Sleppur føroyska kvinnulandsliðið í hondbólti við til Challenge-Trophy í Bosnia, verður neyðugt at framskunda Sunset-finalurnar tvær vikur**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Spælararnir vóna sjálvandi, at Føroyar aftur í ár verður partur av Challenge-Trophy kappingini. Men ein føroysk luttøka krevur, at endaspurturni í landskappingini verður umlagdur*

Í Hondbóltssambandinum bíða tey í spenningi eftir boðunum, hvørt føroyska kvinnulandsliðið í ár sleppur upp í part í Challenge-Trophy kappingini, sum hesa ferð verður hildin í Bosnia.

Átta lið sleppa við hvørja ferð, og Føroyar hava biðið um at verða partur av hesum. Útlitini mugu eisini sigast at vera góð, eftir framúr væl eydnaðu luttøkuna í Mezzocorona í Italia fyri tveimum árum síðani, og tí er væntandi, at Europeiska Hondbóltssamgongan tekur Føroyra við í pottin.

Freistin at bíleggja at gongumerki til kappingina var úti sunnudagin, og væntandi skuldi HSF fáa svar um hetta í dag.

Einki er at ivast í, at bæði HSF og spælarar í spenningi bíða eftir svarinum. Men hjá teimum, sum leggja kappingina tilrættis, er spenningurin eisini stórur. Eftir verandi skipan, so verður ein møgulig triða og seinasta finala spæld 12. apríl. Men tá Challenge-Trophy byrjar longu 2. apríl, gevur hetta sjálvsagdar trupulleikar. Ikki minst, tí venjararnir hjá kvinnulandsliðnum sjálvandi hava vónir um, at spælararnir kunnu venja saman nakrar ferðir áðrenn fráferðina.

### Broyta kappingina

Jógvan Martin Mørk, kappingarleiðari hjá HSF, sigur, at tey hava vitað av hesum spurninginum, tá kappingin varð løgd, og at tey eisini eru til reiðar at broyta kappingina, um hetta verður neyðugt.

– Tá kappingin er sett at enda 8. ella 12. apríl, so er hetta gjørt, tí vit á tann hátt kunnu hava sutt skotbráð millum næstu og møguliga triðu finaluna. Hetta tí 8. apríl er dagurin fyri pálmasunnudagin, og tá kunnu vit so flyta seinasta dystin til mikudagin fyri páskir. Ella kanska til skírisdag, sigur Jógvan Martin.

– Men samstundis hava vit rúm fyri flytingum, um hetta verður neyðugt, leggur hann afturat.

– Vit hava sum er nøkur dystarfrí vikuskifti, sum uttan hóvastták kunnu takast í nýtslu. Og verður onnur hálvfinalan sett á skránna mikudag, so er møguleiki at hava seinasta finaludystin 26. mars. Altso 19. mars, um FM-heitið er avgjørt eftir tær báðar fyrstu finalurnar. Og tá skuldi størsti parturin av trupulleikanum verið loystur, sigur Jógvan Martin.

### Venjararnir bíða

Vit hava spurt annnan av landsliðsvenjarunum, Rógva Nielsen, hvørt hann metir tað vera nóg góð fyrireikingartíð, um spælararnir fáa frí tann 26. mars – bara eina viku undan fráferðini til Bosnia. Rógvi sigur seg tó ikki vilja gera nakrar sum helst viðmerkingar um hetta, fyrr enn tað er staðfest, hvørt føroyska kvinnulandsliðið verður partur av Challenge-Trophy ella ikki.

Afturat Rógva er Flemming Raben eisini venjari hjá kvinnulandsliðnum.

## Annika gevst í Neistanum



Annika Ljósstein hevur í vetur verið ein av spælarunum, sum hava stykt um besta kvinnuliðið hjá Neistanum.

Ivaleyst høvdu tey í felagnum vónað, at klaksvíkarkvinnan eisini kundi vera ein av berandi kreftunum, nú avgerandi dystirnir í lands- og steypakapping standa fyri framman. Men tað verður so av ongum.

Í morgin fer Annika nevnliga av landinum, og komandi tríggjar mánaðirnar verður hon støðd í Viborg í útbúgvingarørindum.

Sjálv harmast Annika nakað um, at hon soleiðis noyðist av liðnum í ótíð, men hinvegin leggur hon afturat, at hetta illa fær bíðað. Serliga tí skúlin, sum hon skal á, bara tekur næmingar inn einaferð um árið.

**-mørk**

## Birminham víðari í FA Cup

Liðfelagarnir hjá Inga Højsted í Birmingham spældu seg týskvøldið víðari í størru ensku steypakappingini

Birmingham megnaði ikki at basa Torquay United í fyrru royndini, og tí varð neyðugt við einum umdysti. Hesuferð hevði Birmingham heimavølli, og tað eydnaðist eisini at vinna á Torquay í aðru syftu.

Støðan var tó 0-0 í steðginum, men í seinna hálvleiki tók Birmingham sær um reiggj. Miðskeiðis í seinna hálvleiki skoraði Jiri Jarosik, og finnin Mikael Forssell. Birmingham er sostatt tilreiðar til fjórða umfar í steypakappingini, har Birmingham skal møta Reading á útivølli.

Ingi Højsted eigur framvegis sín fyrsta til fyri Birmingham til góðar.

**-SíS**

# Javnt í 1.Deild

**Liðkappingin í Bridge fyri 1, 2 og 3.deild byrjaði síðsta vikuskiftið í skúlanum í Sørvági.Eftir at trý tey fyrstu umførini eru leikt má sigast at kappingarárið 2006 kann gerast sera spennandi. Einans í 3.deild hevur eitt lið lagt seg klárt á odda**

**BRIDGE**
*Bogi Simonsen*

Í 1.deild eru trý lið farin avstað frá hinum. Tað eru liðini hjá Allan Dal- Christiansen, Boga Simonsen og liðið hjá Símin Lassaberg. Hesi liðini vóru eisini mett sum greiðir favorittar undan kappingina.

**Støðan í 1.Deild**

| | |
|---|---|
| 1 Símin Lassaberg | 66 |
| 2 Bogi Simonsen | 62 |
| 3 Allan Dal-Christiansen | 61 |
| 4 Jóna Grunnveit | 31 |
| 5 Eyðun Jacobsen | 24 |
| 6 Óli Holm | 23 |

Multihold er ein útrokning, ið áleið sigur, hvussu tey einkultu pørini á einum liðið hava klára seg.

**Multihold 1.Deild**

Fýra tey bestu

| | |
|---|---|
| 1) Marner Joensen - Dia Jacobsen | 20,06 (4) |
| 2) Allan Dal- Christiansen - Robert Langaard | 19,75 (4) |
| 3) Bogi Simonsen - Hallberg Arnfríðsson | 19,63 (4) |
| 4) Heðin Mouritsen - Jóannes Mouritsen | 17,38 (4) |

Í 2.deild er kappingin eisini sera jøvn og stríðið um at vinna sær sess í bestu deildini kann gerast sera hart.

Liðið hjá Marjun Restorff hevur lagt seg á odda eftir trý tey fyrstu umførini, men liðini hjá Hallur Ellingsgaard og Jórun Johannesen líka í hølinum.

**Støðan í 2.Deild**

| | |
|---|---|
| 1 Marjun Restorff | 59 |
| 2 Hallur Ellingsgaard | 57 |
| 3 Jórun Johannesen | 51 |
| 4 Marita Krosstein | 37 |
| 5 Jákup Egholm | 35 |
| 6 MBM | 30 |

**Multihold 2.Deild**

Fýra tey bestu

| | |
|---|---|
| 1 Hans Egil Joensen - Edmund Joensen | 17,13 (6) |
| 2 Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen | 17,03 (6) |
| 3 Oddmar Danielsen - Einar Ellingsgaard | 16,67 (6) |
| 4 Hallur Ellingsgaard - Páll Hansen | 16,03 (6) |

Spenningurin í 3.deild er ikki so stórur, her hevur liðið hjá Jens Paula G. Nolsøe lagt seg klárt á odda eftir tey fyrstu umførini. Liðið hjá Knút Nygaard er á øðrum plássið meðan liðið hjá Súsonnu Dam er á triðja plássið.

Á liðinum hjá Jens Paula G. Nolsøe eru umframt Jens Paula G. Nolsøe og Danny Danielsen, eisini tvær ungar damur, ið luttaka í liðkappingini fyri fyrstu ferð. Tær eru Eva Berg og Anna Olsen.

**Støðan í 3.Deild**

| | |
|---|---|
| 1 Jens Pauli G. Nolsøe | 67 |
| 2 Knútur Nygaard | 49 |
| 3 Súsanna Dam | 33 |
| 4 EyB 3 | 29 |

**Multihold 3.Deild**

| | |
|---|---|
| 1 Jens Pauli G. Nolsøe - Danny danielsen | 20,89 (6) |
| 2 Knútur Nygaard - Áki Dimon | 16,50 (6) |
| 3 Eva Berg - Anna Olsen | 16,17 (6) |
| 4 Jóhan í Smiðjuni - Petur Gærdbo | 14,06 (6) |

Næstu umførini í liðkappingini verða leikt leygardagin 4. februar í Eysturoynni.